VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Fleyr til gul av vestri, um kvøldið veksur hann vindin upp í stívt andøvsgul av útsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 9 og 12 stig.



Veðrið hósdagin:
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi, um kvøldið hækkar hann upp í útnyrðing. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 11 og 14 stig, men um kvøldið kaldari.



Veðrið fríggjadagin:
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útnyrðingi og ælingur, partvís vátakavi. Hitin millum 2 og 5 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Leygardagin upp í hvassan vind av norði og kavaælingur. Hitin um frostmarkið. Sunnudagin hvassur vindur av útsynningi og regn. Lýggjari.

Børn og eldri syngja saman

Týsdagin hevði Tilhaldið í Havn eina heldur sjáldsama vitjan. Børn úr øðrum flokki í Kommunuskúlanum og eldri fólk úr Aberdeen, sum eru her í sambandi við skotsku vikuna

ELDRAHUGNI
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

Ein heilt serlig hugnaløta var í Tilhaldinum í Havn týsmorgunin. Tað serstaka við tí var, at hendan morgunin vóru ikki bara eldri fólk savnað og ikki bara havnarfólk. Børn úr øðrum flokki úr Kommunuskúlanum vóru komin á vitjan, og eisini ein bólkur av skotum, sum eru her í sambandi við ta skotsku vikuna, sum er í Havn hesa vikuna.

Hendan skotska vikan er ein liður í vinarbýarsamstarvinum millum Aberdeen og Tórshavn.

Ferðalagið kom til Havnar mánakvøldið og tað fyrsta, sum tey upplivdu í dagsljósi í Havnini, vóru hesar avbera fittu barnarøddirnar, sum sungu bæði á føroyskum og enskum fyri teimum.

Hugnaløtan byrjaði klokkan tíggju. Skotarnir vóru nakað seinkaðir, men hini byrjaðu bara, tí børnini høvdu ein buss at náa, sum skuldi koyra tey heim aftaná. Børn og gomul sungu fyrst Nú vakni øll úr svøvni glað og Nú hitar sólin bjarta úr einum sanghefti við nógvum vøkrum og kendum sangum í. Síðani varð Faðir vár biðið.

So komu skotarnir, meðan tann triði sangurin varð sungin.

Jákup Lindenskov beyð teimum at vera hjartaliga vælkomnum og segði millum annað, at hetta var ein heilt serligur dagur í Tilhaldinum, tí at hetta var fyrstu ferð, at Tilhaldið hevði fingið so forkunnuga vitjan.

Fegnir skotar

Skotarnir, sum vitjaðu Tilhaldið hendan dagin, vóru sum sagt komnir til landið kvøldið fyri. Ein talskvinna hjá teimum segði, at tey vóru sera fegin um hendan møguleikan at vitja Tilhaldið. Tí tað eru seks eldri fólk í teirra ferðalagi, og á hendan hátt kendu tey tað, sum at samfelagið lat seg upp og lovaði teimum at luttaka í tí.

– Børnini eru avbera fitt, og tey syngja sum einglar, segði hon.

Hon greiddi frá, at skráin hjá teimum er tættpakkað líka til hósdagin, tá leiðin gongur aftur til Aberdeen.

Børn og gomul – bæði føroysk og skotsk – sungu nógvar og vakrar sangir saman til hugnaløtuna í Tilhaldinum í Havn týsmorgunin
Mynd: Jens K. Vang

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	8
Nuuk	8
Qaqortoq	10
Ammassalik	5
Saint John's	17
Halifax	20
Reykjavík	10
Seyðisfjørður	10
Tórshavn	10
Lerwick	11
Aberdeen	15
London	6
Tromsø	9
Bergen	–
Oslo	–
Stokkhólm	13
Keypmannah.	7
Helsinki	16
Moskva	15
Berlin	16
Warzawa	17
Kiev	20
Bukarest	17
Paris	24
Madrid	18
Róm	27
Malorca	25
Athen	22
Malta	28
Tunis	21
Beijing	30
New Dehli	31
Bangkok	32
Jakarta	22
Sydney	19
New York	30
Miami	18
Los Angeles	–
Meksikobýur	–
Panama	14
La Paz	–
Rio de Janeiro	16
Buenos Aires	

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 1005 hPa. við Skotland grynnist. Eitt annað lágtrýst, 1018 hPa. við Hvarvið fer eystureftir.

Lágtrýstið vestan fyri Ísland fer í landnyrðing og dýpist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósdagin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 29/08 kl. 06⁰⁰– 30/09 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,2°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

AVFALLIÐ



Avfallið: 3,3 mm – mált frá 29/09 kl. 06⁰⁰–30/09 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í august: 90,9 mm

www.sosialurin.fo

VESTFALLSKYRRINDI

28. september: Mánin næstur jørðini
2. oktober: Fyrra kvarter

Kelda: Almanakkin 2003

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
1. okt	11.32	—	10.32	23.01	10.47	23.16	01.04	13.32	02.04	14.32	09.47	22.16	08.47	21.16	11.47	—	00.19	12.47	11.17	23.46	00.04	12.32
2. okt	00.01	12.45	11.45	—	-	12.00	02.01	14.45	03.01	15.45	11.00	23.43	10.00	22.43	00.16	13.00	01.16	14.00	—	12.30	01.01	13.45
3. okt	01.28	14.10	00.28	13.10	00.43	13.25	03.28	16.10	04.28	17.10	—	12.25	11.25	—	01.43	14.25	02.43	15.25	01.13	13.55	02.28	15.10
4. okt	02.53	15.20	01.53	14.20	02.08	14.35	04.53	17.20	05.53	18.20	01.08	13.35	00.08	12.35	03.08	15.35	04.08	16.35	02.38	15.05	03.53	16.20

5 707265 100036 >